# Kirkjuliga Heimamissiónin í Føroyum

Ársroknskapur fyri 2018

# INNIHALDSYVIRLIT

| | SÍÐA |
|---|---|
| UPPLÝSINGAR UM KIRKJULIGU HEIMAMISSIÓNINA Í FØROYUM | 2 |
| LEIÐSLUFRÁGREIÐING | 3 |
| ROKNSKAPARÁTEKNING LEIÐSLUNNAR | 4 |
| VÁTTAN FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA | 5 |
| NÝTTAR ROKNSKAPARREGLUR | 7 |
| RAKSTRARÚRSLIT | 10 |
| FÍGGJARSTØÐA | 11 |
| NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN | 13 |

# UPPLÝSINGAR UM KIRKJULIGU HEIMAMISSIÓNINA Í FØROYUM

Kirkjuliga Heimamissiónin í Føroyum
FO-437 Nesvík

Telefon 47 00 00
Telefaks 47 00 01

Heimstaður: Nesvík

Heimasíða: www.mission.fo
t-post bústaður: hm@mission.fo

**Aðalskrivari**
Andrias Magnussen

**Fíggjarleiðari**
Ata Jacobsen

**Høvuðsstýrið**
Símun Persson Jacobsen, formaður
Mariann Djurhuus Poulsen, næstformaður
Jan Johannesen, 2. næstformaður
Ragnar Groth Mortensen
Óli Marner Christiansen
~~Karl Michaelsen~~
Jógvan Reynslág
Ovi Brim

**Grannskoðari**
SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

**Ársúrslitið**
Ársúrslitið fyri 2018 er upp á 407.644 kr. í mun til 555.876 kr. í 2017.

**Framtíðarvánir**
Leiðslan metir, at úrslitið komandi ár fer at javnviga.

**Peningaviðurskifti**
Fíggjarstøðan javnvigar við 38.874 tkr. Eginognin er 3.609 tkr., svarandi til 9,2%.

**Býtið av úrslitinum**
Skotið verður upp, at ársúrslitið upp á 407 tkr. verður flutt til komandi ár.

**Útbygging av Leguhúsinum í Nesvík**
Leingi hevur ynski verið frammi um at víðka um virksemi og hølisviðurskiftini og í 2014 byrjaðu veruligu fyrireikingarnar at fara undir útbyggingina av Leguhúsinum í Nesvík, tá gongd varð sett á arbeiðið við útgrevstrinum.

Á vári í 2016 góðkendi Høvuðsstýrið byggisáttmálan fyri útbyggingina, sum er í trimum byggistigum, umframt sáttmála um byggileiðslu og eftirlit. Arbeiðið hesum viðvíkjandi gongur eftir ætlan.

Seinastu árini hevur miðvíst arbeiði verið gjørt viðvíkjandi peningainnsavnan til verkætlanina. Arbeiðið hevur gingið væl og við árslok 2018 vóru innsavnaðar 20,4 mió.kr. til samans til endalmálið.

Í 2014 byrjaði útbyggingin av Leguhúsinum í Nesvík, og við árslok 2018 eru nýttar til samans 25,7 mió.kr. Samlaði kostnaðurin fyri útbyggingina er mettur til á leið 32 mió.kr. Umframt at útbyggingin verður stuðlað við gávum, hevur stýrið samtykt at taka tvey bankalán at fíggja útbyggingina. Fyrra lánið er útgoldið í 2017, meðan seinna lánið er útgoldið í 2018. Lánini skulu gjaldast aftur yvir 15 ár.

Í mun til upprunaligu tíðarætlanina eru nakrar seinkingar, men høllin, skiftingarrúmini og millumgongin verða væntandi liðug áðrenn summarlegurnar byrja.

## ROKNSKAPARÁTEKNING LEIÐSLUNNAR

Høvuðsstýrið hevur í dag viðgjørt og viðtikið ársroknskapin og ársfrágreiðingina.

Roknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við galdandi roknskaparreglur. Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2018, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 2018.

Ársroknskapurin verður lagdur fram til góðkenningar ársaðalfundsins.

Tórshavn hin 1. apríl 2019

Aðalskrivari:

Andrias Magnussen

Høvuðsstýrið:

| | | |
|---|---|---|
| Símun Persson Jacobsen<br>*formaður* | Mariann Djurhuus Poulsen<br>*næstformaður* | Jan Johannesen<br>*2. næstformaður* |
| Ragnar Groth Mortensen | Óli Marner Christiansen | ~~Karl Michaelsen~~ |
| Jógvan Reynslág | Ovi Brim | |

Hesin roknskapur er framlagdur og góðkendur av ársaðalfundinum hjá Kirkjuligu Heimamissiónini í Føroyum

hin 01. 04 2019

(fundarstjóri)

# GRANNSKOÐARAÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

*Til høvuðsstýrið í Kirkjuligu Heimamissiónini í Føroyum*

## Grannskoðanarátekning á ársroknskapin

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Kirkjuligu Heimamissiónini í Føroyum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2018 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember og úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2018 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku reglunum fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava lokið onnur etisk krøv, sum vit hava sambært hesum reglum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at gera ársroknskapin uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt felagið megnar at halda áfram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka felagið, steðga rakstrinum ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

**Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum**

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini. Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.

## GRANNSKOÐARAÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.

- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi, eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni eru rímiligar.

- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera ársroknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað, við støði í teimum grann- skoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt felagið megnar at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanarátekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðanarátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at felagið ikki er ført fyri at halda áfram við rakstrinum.

- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær vit vænta at grannskoða. Harumframt samskifta vit um týðandi eygleiðingar í sambandi við grannskoðanina, so sum týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit eru komin fram á í sambandi við grannskoðanina.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**
Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Tað er okkara ábyrgd, í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum, at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi meta um, hvørt samanhangur er millum leiðslufrágreiðingina og ársroknskapin, ella um hon er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er harumframt at hugsa um hvørt leiðslufrágreiðingin hevur kravdu upplýsingarnar samsvarandi ársroknskaparlógini.

Grundað á gjørda arbeiðið er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin samsvarar við ársroknskapin, og at hon er gjørd samsvarandi krøvunum í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi feilir í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn hin 1. apríl 2019
SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Mirjam Haraldsen
*statsaut. revisor*

## NÝTTAR ROKNSKAPARREGLUR

Ársroknskapurin fyri Kirkjuligu Heimamissiónina í Føroyum er gjørdur eftir ásetingunum í ársroknskaparlógini fyri feløg í bólki A.

Nýttu roknskaparreglurnar eru óbroyttar í mun til undanfarna ár.

**Um innroknan og virðisáseting í ársroknskapinum**
Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða vunnar eins og virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir, íroknað avskrivingar og niðurskrivingar, innroknaðir.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini fær fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognini kann gerast upp álítandi

Skyldur verða tiknar við í fíggjarstøðuna,tá ið tað er sannlíkt, at felagsskapurin í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kunnu gerast upp álítandi.

Til at byrja við verða ognir og skyldur innroknaðar til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum lýst niðanfyri fyri einstøku roknskaparpostarnar.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiseraðan kostprís, og sostatt verður ein konstant effektiv renta innroknað yvir gildistíðina. Amortiseraður kostprísur verður uppgjørdur sum upprunaligur kostprísur við frádrátti av møguligum avdráttum og ískoyti/frádrátti av samlaðu amortiseringini av muninum millum kostprís og áljóðandi virði.

Í sambandi við innrokning og virðisáseting verður hædd tikin fyri væntaðum tapum og vandum, sum íkoma áðrenn ársfrásøgnin verður løgd fram, og sum sanna ella avsanna viðurskifti, ið vóru til staðar fíggjarstøðudagin.

**Avleidd fíggjartól**
Avleidd fíggjartól verða í fyrstu atløgu upptikin til kostprís í fíggjarstøðuni, og verða síðani mett til dagsvirði. Positiv og negativ dagsvirði av avleiddum fíggjartólum verða upptikin sum onnur áogn ávikavist onnur skuld.

Broytingar í dagsvirðinum av avleiddum fíggjartólum, sum eru ætlað til og lúka krøvini til tryggjan av dagsvirðinum av eini íroknaðari ogn ella skyldu, verða upptiknar í rakstrarroknskapinum saman við broytingum í virðinum av tryggjaðu ognini ella av tryggjaðu skylduni.

Broytingar í dagsvirðinum av avleiddum fíggjartólum, sum eru ætlað til og lúka krøvini til tryggjan av framtíðar ognum ella skyldum, verða upptiknar beinleiðis á eginpeningin. Inntøkur og kostnaðir viðvíkjandi slíkum trygdartransaktiónum verða flutt frá eginpeninginum við realisering av tí tryggjaða, og verða upptikin í sama roknskaparpost sum tað tryggjaða.

Viðvíkjandi avleiddum fíggjartólum, ið ikki lúka krøvini til viðgerð sum trygdartól, verða broytingar upptiknar til dagsvirði so hvørt í rakstrarroknskapinum.

## NÝTTAR ROKNSKAPARREGLUR

**Inntøkur**
Inntøkur frá gávum og innsavningum verða tiknar við í rakstarroknskapin, tá ið hesar verða latnar, meðan inntøkur frá sølu av vørum og tænastum verða tiknar við í rakstrarroknskapin, um fakturering er farin fram áðrenn árslok.

Gávur og stuðul, sum felagsskapurin móttekur til serlig endamál ella til ávísa verkætlan, sum onki hevur við dagliga raksturin av felagsskapinum at gera, verða ikki rakstrarførd, men skrásett beinleiðis í fíggjarstøðuna undir tíðaravmarkingum.

**Útreiðslur**
Útreiðslur verða rakstrarførdar í tí ári tær viðvíkja.

**Starvsfólkakostnaður**
Starvsfólkakostnaður fevnir um lønir, íroknað frítíðarløn og eftirlønir umframt aðrar kostnaðir til sosiala trygd v.m. til starvsfólk felagsins. Móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum eru drigin frá starvsfólkakostnaðinum

**Fíggjarligar inntøkur**
Renturnar verða innroknaðar í rakstrarroknskapin við teirri upphædd, sum viðvíkur roknskaparárinum.

Rentuinntøkur av støðlaðum peningi í sambandi við avsetingar, verða ikki inntøkuførd í rakstrinum, men beinleiðis á avsetingarkontur.

**Fíggjarligar útreiðslur**
Fíggjarligar útreiðslur fevna um rentuútreiðslur og bankakostnað í árinum.

**Materiell støðisogn**
Materiell støðisogn verður virðissett til útveganarprís við frádrátti av samlaðum gjørdum av- og niðurskrivingum.

Avskrivingargrundarlagið er kostprísur við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokan nýtslutíð. Grundøki verða ikki avskrivað.

Kostprísur er útveganarprísur umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini og til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu.

Rentukostnaðir viðvíkjandi lánum til fígging av bygging av materiellari støðisogn og sum viðvíkja byggitíðarskeiðinum, verða innroknaðir í kostprísin. Allir aðrir lánikostnaðir verða innroknaðir í rakstrarroknskapin.

## NÝTTAR ROKNSKAPARREGLUR

Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og sett út frá væntaðu brúkstíðini og mettum restvirði:

| | |
|---|---|
| Leguhúsið (gamli parturin) | Fult út avskrivað |
| Spælipláss (gamli parturin) | Fult út avskrivað |
| Tøkniogn | 3 ár |
| Innbúgv | 3 ár |
| Onnur rakstrargøgn | 4 ár |

Leguhúsið og spæliplássið hava verið avskrivað við somu upphædd sum lániskuldin í ávikavist leguhúsinum og spæliplássinum hevur verið niðurgoldin við. Nú øll skuldin er goldin, eru leguhúsið og spæliplássið fult út avskrivað.

Vinningur ella tap í sambandi við sølu av materiellari støðisogn verða gjørd upp sum munurin millum søluupphæddina, við frádrátti av sølukostnaði, og roknskaparliga virðið av støðisognini søludagin. Vinningur ella tap verða innroknað undir aðrar rakstrarinntøkur og -útreiðslur.

**Vørugoymslur**
Vørugoymslur verða virðisásettar til kostprís eftir FIFO háttinum. Er nettosøluvirði lægri enn kostprísurin, verður goymslan niðurskrivað til hetta lægra virði.

Egnar útgávur av bókum verða avskrivaðar yvir 3 ár.

**Áogn**
Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, har hædd verður tikin fyri væntaðum tapum. Upphæddirnar eru metta hvør sær.

**Virðisbrøv**
Virðisbrøv, ið eru tikin við sum ogn í umferð, verða virðisásett til kursvirðið við roknskaparlok.

**Skuld**
Onnur skuld verður virðissett til nettorealisatíónsvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

**Tíðaravmarkingar**
Tíðaravmarkingar, ið eru tiknar við sum skuld, fevna um móttiknar gjaldingar viðvíkjandi inntøkum í komandi roknskaparári

Móttiknar gávur og stuðul, sum eru oyramerktar til ávís endamál, verða innroknað undir tíðaravmarkingum; upphæddirnar verða inntøkuførdar so hvørt sum útreiðslurnar, sum gávan ella stuðulin eru latin til, vera rakstrarførd. Gávur og stuðul til útbygging av Leguhúsinum í Nesvík verða inntøkuførdar so hvørt sum Leguhúsið verður avskrivað.

## RAKSTRARÚRSLIT FYRI ÁRIÐ 2018

| Nota | | | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|---|
| | | | kr. | kr. |
| | **Inntøkur** | | | |
| | Fastar gávur | | 2.095.851 | 2.490.675 |
| | Innsavningar | | 683.212 | 523.132 |
| | Gávur | | 317.510 | 267.507 |
| | Søla av vørum | | 2.425.149 | 1.874.913 |
| | Søla av tænastum | | 1.458.348 | 1.653.339 |
| | Onnur søla | | 3.787 | 28.880 |
| | Inntøkur, serlig tiltøk | | 21.297 | 56.769 |
| | Rentur | | 21 | 1.590 |
| | Inntøkur, tiltøk | 1.995.605 | | |
| | Útreiðslur, tiltøk | -1.764.137 | 231.468 | 103.078 |
| | **Inntøkur til samans** | | 7.236.643 | 6.999.883 |
| | **Útreiðslur** | | | |
| | Fyrisiting | | -539.200 | -525.670 |
| 1 | Starvsfólkakostnaður | | -3.490.701 | -3.312.431 |
| | Aðrar vanligar útreiðslur | | -932.616 | -816.754 |
| | Keyp av vørum | | -1.653.234 | -1.579.044 |
| | Keyp av tænastum | | -135.568 | -145.375 |
| | Annað keyp | | -59.938 | -41.874 |
| | Fíggjarligar útreiðslur | | -8.029 | -5.828 |
| | **Útreiðslur áðrenn avskrivingar v.m.** | | -6.819.286 | -6.426.976 |
| | Staðfest tap upp á skuldarar | | 0 | 0 |
| 2 | Avskrivingar o.t. | | -9.713 | -17.031 |
| | **Avskrivingar v.m. til samans** | | -9.713 | -17.031 |
| | **Útreiðslur til samans** | | -6.828.999 | -6.444.007 |
| | **Úrslit** | | 407.644 | 555.876 |

**Skotið verður upp, at úrslitið verður býtt soleiðis:**

| | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| Flutt til Trygdargrunn | 0 | 3.985 |
| Flutt til komandi ár | 407.644 | 551.891 |
| | 407.644 | 555.876 |

## FÍGGJARSTØÐA HIN 31. DESEMBER 2018

| Nota | | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| | **OGN** | | |
| | **Støðisogn** | | |
| 2 | **Materiell støðisogn** | | |
| | Bygningar | 0 | 0 |
| | Bygningur í gerð (útbygging av Leguhúsinum í Nesvík) | 25.667.361 | 14.462.811 |
| | Spælipláss | 0 | 0 |
| | Tøkniogn | 36.266 | 15.512 |
| | Innbúgv | 0 | 0 |
| | Onnur rakstrargøgn | 0 | 0 |
| | | 25.703.627 | 14.478.323 |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | **Vørugoymslur** | | |
| | Vørugoymsla, HMF | 210.575 | 254.322 |
| | Vørugoymsla, LH | 28.130 | 43.849 |
| | | 238.705 | 298.171 |
| | **Áogn** | | |
| | Skuldarar | 1.051.230 | 862.300 |
| | Forútgoldið | 389.065 | 0 |
| | Mvg-áogn | 397.691 | 730.741 |
| | | 1.837.986 | 1.593.041 |
| 3 | **Tøkur peningur** | | |
| | Tøkur peningur | 818.033 | 1.919.895 |
| | Tøkur peningur oyramerktur til ávís endamál og Trygdaravseting | 8.278.090 | 12.874.299 |
| | | 9.096.123 | 14.794.194 |
| | **Ogn í umferð til samans** | 11.172.814 | 16.685.406 |
| | **OGN TIL SAMANS** | 38.876.441 | 31.163.729 |

# FÍGGJARSTØÐA HIN 31. DESEMBER 2018

| Nota | | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| | **SKYLDUR** | | |
| 4 | **Eginogn** | | |
| | Trygdargrunnur | 2.116.203 | 2.116.203 |
| | Grunnur fyri dagsvirði á avleiddum fíggjartólum | -151.019 | -114.693 |
| | Fluttur vinningur til samans | 1.644.151 | 1.236.508 |
| | **Eginogn til samans** | 3.609.335 | 3.238.018 |
| | **Langfreistað skuld** | | |
| | Bankaskuld ísv. útbygging av Leguhúsinum | 10.493.249 | 5.619.085 |
| | **Langfreistað skuld til samans** | 10.493.249 | 5.619.085 |
| | Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 757.932 | 370.639 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 347.837 | 1.615.347 |
| | Aðrir ognarar | 100.000 | 100.000 |
| | Avsett til skylduga frítíðarløn | 274.013 | 217.950 |
| | Tíðaravmarkingar | 199.009 | 536.906 |
| 5 | Tíðaravmarkingar (gávur og stuðul til ávís endamál) | 20.944.047 | 19.351.091 |
| | Avleidd fíggjartól | 151.019 | 114.693 |
| | | 22.773.857 | 22.306.626 |
| | **Skuld til samans** | 33.267.106 | 27.925.711 |
| | **SKYLDUR TIL SAMANS** | 36.876.441 | 31.163.729 |
| 6 | **Eventualskyldur og veðsetingar** | | |

## NOTUR TIL ÁRSROKNSKAPIN

### 1 Starvsfólkakostnaður

| | 2018 kr. | 2017 kr. |
|---|---|---|
| Starvsfólkalønir | 2.858.749 | 2.683.335 |
| Eftirlønir | 383.724 | 380.075 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 132.785 | 138.574 |
| Annar starvsfólkakostnaður | 115.443 | 110.447 |
| | 3.490.701 | 3.312.431 |

Í rokskaparárinum hevur talið av starvsfólkum verið 13. Til samanbering kann nevnast, at í 2017 vóru 12 starvsfólk.

### 2 Materiell støðisogn

| | Bygningar | Bygningur í gerð | Spæli-pláss | Tøkni-ogn | Innbúgv | Onnur rakstartól |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Salda við ársbyrjan | 5.596.540 | 14.462.811 | 455.646 | 349.069 | 163.796 | 797.786 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 11.204.550 | 0 | 30.467 | 0 | 0 |
| Salda við árslok | 5.596.540 | 25.667.361 | 455.646 | 379.536 | 163.796 | 797.786 |
| Avskrivingar við ársbyrjan | -5.596.540 | 0 | -455.646 | -333.557 | -163.796 | 797.786 |
| Avskrivingar í árinum | 0 | 0 | 0 | -9.713 | 0 | 0 |
| Avskrivingar við árslok | -5.596.540 | 0 | -455.646 | -343.270 | -163.796 | 797.786 |
| Rokskaparligt virði við árslok | 0 | 25.667.361 | 0 | 36.266 | 0 | 0 |
| Verður avskrivað yvir | - | 30 ár | - | 3 ár | 3 ár | 4 ár |

## 3 Tøkur peningur – oyramerktur til ávís endamál og Trygdaravseting

| | | 2018 | 2017 |
|---|---|---|---|
| Oyramerktur peningur við ársbyrjan | | 12.874.299 | 12.669.546 |
| Flutt frá ársúrslitinum undanfarin ár | | 3.985 | 292.372 |
| Rentur og gávur í árinum | | 1.604.687 | 1.948.615 |
| Brúkt av avseting í Vestmanna | | -11.731 | -15.672 |
| Brúkt av oyramerktum peningi til útbygging av Leguhúsinum í Nesvík: | | | |
| • byggikostnaður, rentuútreiðslur og lánsgjøld | -11.204.550 | | |
| • lánsgjøld | -961.400 | | |
| • upptøka av láni, netto | 5.972.800 | -6.193.150 | -2.020.562 |
| | | 8.278.090 | 12.874.299 |

## 4 Eginogn

| Trygdargrunnur | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| Avsett við ársbyrjan | 2.116.203 | 2.112.218 |
| Flutt frá ársúrslitinum (íroknað rætting av feili ísv. tíðargreining í 2016) | 0 | 3.985 |
| | 2.116.203 | 2.116.203 |
| **Grunnur fyri dagsvirði á avleiddum fíggjartólum** | | |
| Lagt í grunn við árslok | -151.019 | -114.693 |
| | -151.019 | -114.693 |
| **Fluttur vinningur** | | |
| Salda við ársbyrjan | 1.236.508 | 684.617 |
| Flutt frá ársúrslitinum | 407.644 | 551.891 |
| | 1.644.152 | 1.236.508 |
| Eginogn til samans | 3.609.335 | 3.238.018 |

## 5 Tíðaravmarkingar (gávur og stuðul til ávís endamál)

### Gávur og stuðul til útbygging av Leguhúsinum í Nesvík

| | 2018 | 2017 |
|---|---|---|
| Salda við ársbyrjan | 18.818.489 | 16.869.874 |
| Rentur og gávur í árinum | 1.604.687 | 1.948.615 |
| | 20.423.176 | 18.818.489 |

Kirkjuliga Heimamissiónin í Føroyum fekk í 2007 pening á kontu í sambandi við søluna av Tórshavnar Sjómansheimi. Dagliga leiðslan samtykti at oyramerkja ein stóran part av gávuni til útbygging av leguhúsinum í Nesvík, meðan restin varð lagt í Trygdargrunn, sum er bólkaður undir eginognini. Harumframt hevur Kirkjuliga Heimamissiónin í Føroyum eisini seinastu árini fingið peningagávur, sum eru oyramerktar til nevndu útbygging. Leiðslan hevur valt, at rentur og kursjavningar av nevndu gávum skulu skrásetast beinleiðis á tíðaravmarkingar og ikki í vanliga rakstrinum.

### Gávur og stuðul til ávís endamál

| | Salda við ársbyrjan | Brúkt í árinum | Salda við árslok |
|---|---|---|---|
| Altjóða Missión | 190.014 | 0 | 190.014 |
| Bókaútgáva | 150.809 | 0 | 150.809 |
| Menning av Leguhúsinum | 122.028 | 0 | 122.028 |
| Serlig endamál í Vestmanna | 69.750 | -11.731 | 58.019 |
| **Til samans** | 532.601 | -11.731 | 520.870 |

## 6 Veðsetingar og trygdarveitingar

Í bygningi felagsins, sum er í gerð við árslok 2018, og hvørs roknskaparliga virð er 25.667 tkr. við árslok 2018, er tinglisið veð upp á 13.800 tkr. sum trygd fyri bankaskuld.

SPEKT | løggildir grannskoðarar

# Eftirlitsblað

Kundi:
Heimavinnusiðnin

Fílanavn: R0 019

Kundanr.: 1036 Ár: 2018

Avhent hevur: DR Hin 19/3-19 Saksnr.:

Umsetast til: Aftur til grannsk. í seinasta lagi: / kl.

| | 1 gjøgnumg (dagf. og navn) | 2 gjøgnumg (dagf. og navn) | 3 gjøgnumg (dagf. og navn) |
|---|---|---|---|
| Skrivað, grannsk. | | | |
| Skrivað, skrivari | | | |
| Umsett, skrivari | | | |
| Rættað, skrivari | 21/3.19 | | |
| Eftirlisið | | | |
| Eftirroknað | | | |
| Avstemmað | | | |
| Konfererað | | | |
| Sæð rættingar, statsaut. | | | |

*Til móttokuna:*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Ljósrit í seinasta lagi | / kl. | / kl. | / kl. |
| Tal av uppskotum | | | |
| Ljósritað | 1/4-19 E.N. | | |

| | Undirskr. eintøk | Undirskr. og sendast aftur til SPEKT | Avrit til kundan | Pdf | Arb.eintak + arkiv |
|---|---|---|---|---|---|
| Roknskapir | 2* | 1 | 10 | | - |
| Skjal til sjálvuppg. | 1 | | | | 1 |
| Protokoll | 1 | 1 | | | - |
| Leiðsluváttan | 1 | 1 | | | - |
| Ætlan | | | | | |
| Metanarfrágr. & bf | 2* | | | | 1 |
| Kommunur | 2** | | | | 1 |
| | | | | | |
| Bræv | 1 | | | | 1 |
| Váttan | | | | | 1 |
| Grunnar og annað | | | | | |

Viðmerkingar:
** 1 eintak til Skrásetingina og 1 til statusbókina*
*** Bæði eintokini sendast til Kommununa. Kommunan sendur eintakið við stemplinum "Fíggjarmálaráðið" víðari*